Í fríum falli

# Survivors í Sjónleikarah

**Leikurin Survivors varð frumsýndur í Sjónleikarahúsinum leygarkvøldið.**
**Talan er um ein-aktara eftir danska leikhøvundanum Kammu Andersen.**
**Í leikskránni og í tíðindaskrivum vil leikurin leiða huga okkara inn á nútímans leiðslumenning, menningarskeið og yvirlivilsistúrar a la Robinsson Ekspeditionen ella Fangerne på Fortet og slíkar. Sum við júst hesum sendingum á TV3 fekk eg hug til at zappa víðari aftaná nakrar minuttir. Leikurin vil fegin verða í eini realistiskari nútímans doku-soap-stíli, men leikritið manglar stutt sagt spenningin, ta skjótu ferðina, óvæntaða vendipunktið, og kemur mestsum ikki longur enn at verða ein stuttsøga í Familje Journalen ístaðin.**

Í Sjónleikarahúsinum frá 10. mars
Survivors
Eftir Kammu Andersen
Týðing: Jón Thorsteinsson
Leikstjórn: Egi Dam
Leikarar:
Aksel Joensen
Nicolaj Falck
Rúna Mortensen
Kristina Christiansen
Gunn W. Reinert
Annika Gregoriussen
René Bischoff
Pallur og Búnar: Anna S. Egilstrøð
Ljóð: Jón McBirnie
Ljós: Árni Baldwinsson og Hjalmar Holm
Hár/Smyrsl: Drós Djurhuus

UMMÆLI
*Gunnvá Zachariasen*
*Myndir: Martin Sirkovsky*

## Lovandi

Ikki tí, uppsetingini í Sjónleikarahúsinum boðaði frá góðari byrjan við eini realistiskari ljóðmynd: onkur dettur, djúpt fall, kaos, skjótt klipp til næstu scenu: ein børa við eini bløðandi gentu, ein maður hjálpir henni, bindur fyri høvdið, gevur henni eina sproytu og forvitni hjá okkum áskoðarum er vakt. Nógvir spurningar eru aftaná fá sekund plantaðir í høvdið: Hvar eru vit? Hvør átti skríggið? Hvat er hent gentuni? Hvør er maðurin? Júst sum eitt anslag við leikbyrjan eigur at vekja, nevnliga forvitnið. Hetta er snildisliga gjørt við eini nærum filmiskari ljóðmynd og skjótum klippum frá einum stað til eitt annað stað. Hetta lovar gott, hugsi eg. Men frá eini fiffigari byrjan við skjótum tempoið, er tað sum leikurin sjálvur fer í frítt fall og vit gita longu tíðliga, hvussu tað man fara at spæla av.

## Krakelarað macho

Vit eru á eini útoyggj í Føroyum. Seks fólk hava meldað seg til eitt yvirlivilsisskeið og hava verið har í seks dagar nú. Hetta er seinasti dagur, so verða tey send til Havnar aftur, annaðhvørt við einum diplomið í hondini ella ikki. Í hvussu er ein skal ein av teimum dumpað, hetta eru reglarnar. Skeiðið verður stýrt við militantari hond av Mister og Master, sum vísa sína makt við vøddum, eini dómarafloytu og við at geva luttakarunum stig ella taka stig frá teimum. Tey hava verið ígjøgnum alskyns uppgávur, hvørs endamál allatíðina er at flyta teirra mørk, ella rættari at bróta teirra psyku niður. Hetta verður millum annað gjørt við at taka samleikan frá teimum, her hava tey ikki nøvn longur, tey eru reduserað til litir: Gula, Reyða, Blái, Grøna, Appelsingula og Lilla, umframt at tey skulu skiftast at verða bólkaleiðarar og arbeiðarar, altso støðugt skifta leiklut í hiarkinum. Og annars skulu tey bert akta boð og gera, sum sagt verður. Søgan byrjar við kaosi: eitt óhapp er hent. Lilla er dottin av línu niður í eina á, er svímað og má fáast inn til fastlandið skjótast gjørligt. Alt er við at krakerlerað og hart pressaðu og troyttu luttakarnir byrja nú at vísa teirra sanna andlit og traðka í karaktér.

Lat okkum byrja við Mister (Aksel Joensen) og tænara hans Master (Nicolaj Falck), tveir testosteronpumpaðar Hjemmeværntypur, sum allarhelst droymdu um eina jagarasoldat karrieru, men dumpaðu við fyrstu mentalroynd. Her er alt fari av lagið og einasta statusvápn, teir nú hava at taka til, er at vísa vøddarnar og dugliga nýta floytuna til at reka luttakarnar higar og hagar - sum seyður í rætt. Trupulleikin hjá teimum er nú, at álvari er komin í spælið og seyðirnir byrja hvør í sínum lagi at vísa tenn afturímóti. Aksel og Nicolaj eru sum typecastaðir til hesar militantu nazitypurnar. Báðir eru avbera góðir áhugaleikarir, kropsliga sterkir og autoriterir á palli og við rætta mótspælinum, høvdu teir kunnu givið hesi krakeleringini eina veruliga dýbd, sum kundi verið áhugaverd og rørandi. Teir royna tó, hvør í sínum lagið, at geva persónunum lív og nuansu, m.a. við góðum sansi fyri timing.

## Ein plukkað høna

Persóngallaríið av skeiðluttakarum er fyri so vítt áhugavert. Her er ábyrgdarfulla Reyða, deildarleiðari á stórari fyritøku við hjartað á røttum stað. Hon hevur veruliga fingið nakað burtur úr øllum avbjóðingunum og átti allarhelst at verið leiðari á skeiðnum, so hevði veruligpersónsmenning farið fram. Reyða tekur eisini leiðsluna til endans og gevur Rúna Mortensen henni eisini ta røttu blandingina av at verða ein ordans bitch til ein veruligan kammerat til teirra, sum eru við at bukka undir í psykiskari møði. Reyða tekur veruliga fat og dugir at plukka eina hønu upp á null komma fimm, ein rættur survivor. So hava vit Grønu (Annika Gregoriussen), tann einasta, sum er komin her av fríum vilja, t.e. ikki send av nakrari fyritøku ella øðrum. Hon vil søkja sannleikan og koma til botns í hesum óhappi, Grøna tvíheldur, at her er farin ein brotsgerð fram, sum ikki eigur at fara fram við borðinum. Og so hava vit Gulu (Gunn W. Reinert), ein egocentrisk sjálvstøðug vinnurekandi, hvørs størsti trupulleiki eru hennara skitnu negl og als ikki ein tilskaðakomin vinkona Lilla. Gula veit hvørjar tangentar ein kvinna skal spæla uppá fyri at yvirliva, nevnliga sexappeal og manipulerandi kvinnulist, nýtt við gløggskygni, so skal hon nokk fáa sítt í síðsta enda. Blái (René Bischoff) einasti manligi luttakarin á skeiðnum, forkelaði ríkmanssonurin, klovnurin, sum allarhelst mest hevur tørv á eini dyggari faðiruppgerð. Og appelsingula (Kristina Christiansen), ein foreldraleys, sum alt sítt lív hevur stríðst fyri at bróta sosiala arvin, hevur fingið sær útbúgving, vil kempa seg fram, men er við at bukka undir í einsemi og angist.

Tey leikandi royna hvør í sínum lagi at geva figurunum kropp og sál. Tað verður kortini ikki til meira enn



